# Ítróttarblaðið

## Lutakastið er í kvøld




Tað er sjónvarpssendingini 3-2 í kvøld, at tað verður gjørt av, hvørji lið hittast í undanumfarinum í kappingini um løgmanssteypið. Í undanumfarinum eru liðini, sum spæla í fjórðbestu og triðbestu deildini, umframt tvey lið úr næstbestu deildini. Í fyrsta umfari eru vinnararnir úr undanumfarinum, hini liðini í næstbestu deildini, og liðini í Vodafonedeildini, sum taka lut.

**Ítróttartoymið á Sosialinum:**


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Rógvi fer aftur til Noregs

**FÓTBÓLTUR Rógvi Baldvinsson, sum hevur royndarvant við B36, fer ikki at spæla við árstalsfelagnum á hesum sinni. Hann er farin aftur til Noregs**

Uni Holm Johannesen

Rógvi Baldvinsson og Kenneth Monsen, sum spældu við Ålgard í triðbestu norsku deildini í fjør, royndarvandu við B36 í januar og februar. Rógvi Baldvinsson hevur verið partur av føroyska landsliðnum, og ætlanin var, at hann skuldi loysa av serbiska Dmitrije Jankovic.

Tað verður ikki á hesum sinni.

Sum skilst roynir 21 ára gamli verjuleikarin at spæla seg til ein sáttmála hjá Viking Stavanger, sum spælir í bestu deildini í Noregi. Um tað ikki eydnast krevur Ålgard, har Rógvi Baldvinsson er sáttmálabundin, eina ov stóra upphædd fyri hann.

Kenneth Monsen er eisini 21 ára gamal. Hann er miðvallari. Hóast hann stóð seg væl undir venjingunum, metti B36 ikki, at hann er ein, sum av álvara kann gera mun í hesum kappingarárinum.

*uni@sosialurin.fo*




***Ítróttarhøllin á Hálsi verður nú umvæld***

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Høllin verður umvæld

**Ítróttarhøllin á Hálsi, har hondbóltslandsliðið eisini spælir sínar heimadystir, verður nú umvæld**

Uni Holm Johannesen

Høllin á Hálsi varð tikin í nýtslu í 1970, og seinastu árini hevur stórur tørvur verið á ábótum og umvælingum.

Fyrsta stigið eru skiftingarrúminum, sum verða umvæld í hesum døgum. Umframt tað er neyðugt við ábótum á loftið og gólvið í høllini.

*uni@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva

Høllin á Hálsi er sostatt meira enn 40 ára gomul, og at hon hevur tørv á ábótum og umvælingum, er ongin ivi um. Skiftirúmini verða nú umvæld, og leingi hevur eisini verið greitt, at loft og gólv hava tørv á ábótum.

*www.kyndil.fo*

Samanumtikið ein rótutur dystur, ið Stíf iðrar seg um ikki at hava vunnið. Sera gott komið aftur av okkara monnum.
Næsti dystur verður móti Neistanum. Hesin dystur skal helst vinnast, um finaluplássið skal røkkast.

*www.vif.fo*

Vit sóu ein dyst Vesturi á Eiðinum í dag, sum í fleiri løtum var merktur av ótryggum spæli hjá báðum pørtum. Men Neistin hevði avgjørt betru verjuna og eisini ta betru skotstyrkina. At so vanligi málverjin hjá VB hevði leikbann, gjørdi tað ikki lættari hjá VB. Ein uppborin sigur til Neistan.

*www.neistin.fo*

Eitt sum sermerkti dystin var tey mongu brotskøstini. Kyndil fekk 8 brotskøst og 6 av hesum fóru inn, meðan H71 fekk 13 har øll uttan tað seinasta fóru í málið. Dánjal tók sær av 10 fulltreffarum, eitt vælaverk og ein sera týdningarmikil uppgáva.

*www.h71.fo*

Georgia og Armenia, sum eru hini liðini í okkara bólki, leiktu javnleik 0-0. Sostatt er stórur spenningur undan seinasta umfari, tí trý lið kappast um fyrsta plássið, sum gevur atgongd til komandi EM-undankapping fyri kvinnulandslið.

*www.fsf.fo*